skemt

# Lorta skelti




Tað verður skeltað við bæði einum og øðrum í Føroyum. Handlar gera vart við prísir og útboð, fyrireikarar vísa á tiltøk og myndugleikar minna á umstøður í ferðsluni.

Og so er tað hetta heldur serstaka skeltið, sum stendur uppi við gomlu kirkjuna í Gøtu. Her verður gjørt púrasta greitt fyri fólki, hvat tað er, sum ikki er loyvt.

Eitt lorta skelti skal steðga hundalívi…




## Hongd út við skelti

Ein 46 ára gomul kvinna í Alabama í USA fekk eina heldur óvanliga revsing fyri at hava stolið í einum Walmart-handli. Dómarin gav kvinnuni eitt val – antin fór hon 60 dagar í fongsul, ella skuldi hon stilla seg uttanfyri handilin við einum skelti í fýra tímar. Kvinnan valdi tað seinna, og á skeltinum stóð við stórum bókstavum: „Eg eri ein tjóvur – eg havi stolið frá Walmart".

## Pegasus ger turkistativ

Síðani eitt felag hjá Sosialinum keypti Studio Pegasus í Klaksvík hevur verið dúgliga tosað og gitt um, hvat studio skal brúkast til frameftir. Fleiri boð hava verið, men enn er tað ikki komið alment fram, hvønn leiklut Pegasus fer at hava í føroysku miðlaverðini. Kanska eitt skelti í einum handli í Havn nú um dagarnar avdúkar eitt sindur um hetta. Har stóð nevniliga, at "Pegasus ger turkistativ". Tað hevur neyvan nakar gitt.



# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.***

### Hvussu smakkar hann?

"Hann streyk avstað eftir eini langari sending frá Alex Jose dos Santos, og nakað nærri fremra málstólpan var Sylla borðreiddur við sínum lívsrætti"

www.dimma.fo

### Tey kunnu eisini vera nógv...

»Tey kunnu vera fá, ið ikki minnist síðsta dystin í Formuladeildini í fjør«

www.dimma.fo

### Eitt gott hugskot?

»Teir leita eftir niðurdotna flogfarinum, har teir rokna við, at tað er dottið niður«

Útvarp Føroya

### Spæla teir altíð 6. umfar í Havn?

» AB er enn eina ferð á vitjan í Gundadali í sætta umfarinum av Formuladeildini.«

www.dimma.fo

### Ørting-effektin

»Clinton kemur seinni«

www.olivant.fo

### Kurt leitar eftir orðum

»Kurt Mørkøre er farin á rannsóknarferð eftir sínum orðum.«

www.dimma.fo

### Blivu teir ikki nr 2?

»EB/Streymur er byrjað, har liðið slepti í fjør, og í løtuni liggja teir á einum 1. plássi.«

www.dimma.fo

### Orðblindur

Blindur breti fley til Australia

www.vikublad.fo

### Trupult roknistykki

»Sandoyingar hava nevniliga ikki vunnið ein landskappingardyst ímóti GÍ síðani 1990. Hetta var árið fyri, at liðið bleiv føroyameistari í 1989«

www.dimma.fo